# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Nýggju bøkkarnir hava bert verið á vøllinum í góðar tvær vikur, men UEFA eftirlitsmaðurin sigur, at hóast liturin ikki er heilt so grønur, er vøllurin góður at spæla á*
*Mynd: Polfoto/AP*

# UEFA óttast vøllin

**Bøkkarnir á Luzhniki Stadion í Moskva hava bert ligið á vøllinum í 15 dagar, og tað gevur høvuðbrýggj í UEFA**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá tað av fyrsta tíð varð kunngjørt, at Champions League-finalan í 2008 skuldi spælast í Moskva, bendi alt á, at talan skuldi verða um søguligan dyst. Heldur enn at stríðast við at hampa um vøllin, sum stóran part av árinum í veruleikanum er grúsvøllur, hevði leiðslan fyri vøllin valt at leggja graslíki á. Og við altjóða góðkenningini, sum graslíki hevur fingið, kundi talan gerast um fyrstu europisku finaluna á øðrum undirlagi enn grasi.

## Gras í 16 dagar

Hildu moskvittarnir fast, so var einki til hindurs fyri, at dysturin varð spældur á graslíki, men eftir umbøn frá UEFA varð tó játtað, at gras skuldi leggjast á vøllin undan sjálvari finaluni.

Nýggjur vøllur varð lagdur oman yvir graslíkið fyri fleiri mánaðum síðani, men í russiska vetrinum hevði hesin sera vánalig gróðrarlíkindi.

Sjálvir ætlaðu russar ikki at gera nakað við hetta, men UEFA-umboðsmaðurin, sum hevði eftirlit við vøllinum, segði, at tað var ikki spælandi á hesum. Og fyri 15 døgum síðani varð nýtt gras lagt á vøllin.

- 15 dagar eru ikki nóg mikið hjá grasinum til veruliga at festa seg, og á sjónvarpsskíggjanum fer grasið ikki at tykjast heilt so grønt. Tekniskt er vøllurin tó í góðum standi, og tí rokni eg ikki við, at hetta fer at tarna dystinum tað allarminsta, sigur Matt Frost, sum hevur eftirlit við vøllinum, við enskar miðlar.

Kostnaðurin av at leggja seinna grasvøllin yvir graslíkið, var á leið 1,8 milliónir krónur.

# Lampard fer ongan veg

**Hóast italskir miðlar hava gitt dúgliga, so slær umboðsmaðurin hjá Frank Lampard fast, at spælarin ikki er til reiðar at skriva sáttmála við italsku meistararnar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Meðan spælararnir hjá Manchester United og Chelsea fyrireika seg til stóru finaluna í morgin, tykjast miðlarnir vera meira áhugaðir í at gita, hvørjar broytingar verða í hópunum hjá feløgunum til komandi kappingarár.

Í Manchester hava tey úr at gera við at greiða frá, at Ronaldo verður verandi í felagnum, og í Chelsea er tað Frank Lampard, sum er offur fyri flestu gitingunum.

Italskir miðlar hava skrivað, at miðvallarin fer at skriva undir sáttmála við Inter, sum um vikuskiftið endurvann italska meistaraheitið, men hetta sigur umboðsmaðurin hjá Lampard, Steve Kutner, seg ikki kenna nakað til.

- Tað er einki um hatta tosið. Eingin hevur tosað við meg. Eg fekk bæði Paul Ince og Patrick Vieira til Inter, so eg rokni við, at eg hevði vitað av, um felagið skuldi keypt Lampard, sigur hann.

- Veruleikin er, at Frank hevur ein stóran dyst í morgin. Og eftir hendan fer hann til Ongland at vera saman við familju síni. Tað hevur hann ikki havt nakran veruligan møguleika til, síðani mamma hansara doyði, og hetta hevur størri týdning enn nakað tos um sáttmála, sigur Kutner.

Frank Lampard hevur sáttmála við Chelsea fram til 2009. Stóran part av hesum árinum hava partarnir samráðst um nýggjan sáttmála, men enn er eingin semja fingin um hendan.

# Selja ikki Ronaldo

**Stjórin í Manchester Inited, David Gill, sigur, at teir hava ongar sum helst ætlanir um at selja mega-stjørnuna til Real Madrid**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur í vikuni ljóðað, at Real Madrid er til reiðar at bjóða Manchester United um £100 milliónir fyri at fáa hendur á Cristiano Ronaldo.

Sjálvur segði spælarin herfyri, at hann væl kundi hugsað sær at roynt seg í sponskum fótbólti fyrr ella seinni, men stendur tað til leiðsluna í felagnu, so verður tað altso seinni.

- Hann hevur fýra ár eftir av verandi sáttmálanum, so vit ivast ikki í, at hann verður verandi nógv ár afturat. Hann er ein av bestu spælarunum í heiminum, og hann spælir við einum felag, har hann vinnur, so hví skuldi hann havt hug at fara nakran veg, sigur David Gill við miðlarnar, nú Manchester United og Ronaldo leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til størsta dystin á árinum.

Sambært somu miðlum, so er ein orsøk til, at felagið kann taka av boðnum frá Real Madrid, stóra skuldin, sum Manchester United hevur. Ein skuldi, sum tátt á átta milliardir krónur. Men heldur ikki hetta er nakað, sum ræðir stjóran í felagnum.

- Fyri at halda okkara gjaldsskyldur hava vit tørv á einum góðum liði, sum vinnur nógv. Og tí málinum røkka vit ikki við at selja Cristiano Ronaldo, sigur hann.